– *Hetta má vera púra tilvildarligt. Eg dugi í øllum førum ikki at síggja aðra forkláring uppá støðuna*

*Ståle Solbakken um merkiliga heystið hjá FCK*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

ÍTRÓTTUR

# 3. Grand Prix umfar í borðtennis




*3. Grand Prix umfar í borðtennis var á skránni í vikuskiftinum. Her gjørdist TBF stóri vinnarin. TBF vann sjey bólkar, Tór vann fimm bólkar og Royn vann tveir*

**3. Grand Prix umfar í borðtennis var um vikuskiftið. Her gjørdist TBF stóri vinnarin, og tey vunnu heili sjey bólkar**

BORÐTENNIS
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið bleiv 3. umfar í Grand Prix kappingini í borðtennis avgreitt í ítróttarhøllini í Trongisvági. Á leið 90 leikarar tóku lut í kappingini úr fimm ymiskum feløgum. Leikarar úr TBF vunnu heili sjey bólkar, meðan Tór vann fimm og Royn tveir.

Í bólki A vann Petur Niclasen úr Tór fyri triðju ferð í ár, men hann fekk sera harða mótstøðu frá Jákupi Hansen og Halli Thorsteinsyni úr ávíkavist Streymi og Tór. Allir tríggir endaðu við seks stigum, men Petur hevði besta settmunin, og gjørdist tískil enn einaferð vinnari av A bólkinum.

Í bólki B gjørdi Susie Midjord úr TBF bart. Hon vann fimm av seks dystum, og eisini hesin bólkurin mátti avgerast við settmuni. Pætur Albinus úr Tór og Sjúrður Ferjá úr TBF gjørdist nr. 2 og 3, ájavnir við Susie í stigum.

Bólk C vann Jónhard Ferjá, sum leikar fyri TBF. Hetta, sjálvt um hann tapti ein av sínum dystum. Jónhard fekk 10 stig, meðan Anna Thomasen úr TBF og Levi Winther úr Tór fingu 8 stig á ávikavist øðrum og triðja plássi.

Annars kunnu vit leggja til merkis, at Tóki Thorsteinsson úr Havn hevur vunnið tríggjar av trimum møguligum kappingum í ár, hóast hann bert hevur leikt borðtennis í knapt eitt ár. Har afturat hava Dánjal Petur Nielsen úr Tór, Jógvan Johansen úr Tór, Eyðun Ellendersen úr Royn og Ólavur Fjørdal úr TBF vunnið tveir bólkar av trimum møguligum í ár.

Næsta kapping, ið BTSF skipar fyri, er FM fyri lið, sum verður í ítróttarhøllini í Trongisvági 14. januar kl. 13.00.

**Bólkavinnarar gjørdist:**

A. Petur Niclasen, Tór
B. Susie Midjord, TBF
C. Jónhard Ferjá, TBF
D. Heini Mortensen, TBF
E. Tóki Thorsteinsson, Tór
F. Danjal P. Nielsen, Tór
G. Eirikur Mørkere, TBF
H. Andrias á Roykheggi, Tór
I. Eyðun Ellendersen, Royn
J. Jógvan Johansen, Tór
K. Charlotta Bech, TBF
L. Ólavur Fjørdal, TBF
M. Rekekka Petersen, TBF
N. Allan Müller, Royn

**Støðan í Grand Prix kappingini eftir 3. umfar:**

| | | |
|---|---|---|
| **Smápinkur** | | |
| 1. Anna Mikkjalsdóttur | TBF | 310 stig |
| 2. Durita Jensen | TBF | 192 stig |
| 3. Sofía Maria Ferjá | TBF | 180 stig |
| **Smápiltar** | | |
| 1. Bjørgvin Sveinbjørnson | Royn | 152 stig |
| 2. Petur Muller | TBF | 142 stig |
| 3. Jónas Wentslau | TBF | 122 stig |
| **Pinkur** | | |
| 1. Lív Øster | TBF | 176 stig |
| 2. Eva Wilhelm | TBF | 170 stig |
| 3. Sára Olsen | TBF | 160 stig |
| **Piltar** | | |
| 1. Eyðfinnur Jensen | Royn | 240 stig |
| 2. Hans Jón Jacobsen | TBF | 180 stig |
| 3. Eyðun Ellendersen | Royn | 152stig |
| **Smágentur** | | |
| 1. Rakul Mikkjalsdóttur | TBF | 710 stig |
| 2. Birita Mortensen | TBF | 360 stig |
| 3. Marin Sofía Brattalíð | TBF | 310 stig |
| **Smádreingir** | | |
| 1. Jákup Thomasen | TBF | 750 stig |
| 2. Jónhard Ferjá | TBF | 680 stig |
| 3. Páll Heri Nolsøe | TBF | 640 stig |
| **Gentur** | | |
| 1. Susie Midjord | TBF | 760 stig |
| 2. Sheila Strøm | TBF | 740 stig |
| 3. Joan Thomasen | TBF | 590 stig |
| **Dreingir** | | |
| 1. Rói Agnarsson | Tór | 900 stig |
| 1. Hallur Thorsteinsson | Tór | 900 stig |
| 3. Fróði Jensen | TBF | 820 stig |
| **Kvinnuunglingar** | | |
| 1. Marin í Dali | TBF | 760 stig |
| 2. Heidi Olsen | Tór | 330 stig |
| 3. Mariann Mikkjalsdóttur | TBF | 300 Stig |
| **Mansunglingar** | | |
| 1. Sigurð Carlsson | Tór | 850 stig |
| 2. Pætur Albinus | Tór | 840 stig |
| 3. Sjúrður Ferjá | TBF | 750 stig |
| **Kvinnur** | | |
| 1. Elin Øster | TBF | 560 stig |
| 2. Petra Muller | TBF | 460 stig |
| 3. Anna Thomasen | TBF | 340 stig |
| **Meistaradeildin** | | |
| 1. Petur Niclasen | Tór | 1000 stig |
| 2. Ragnar Egilsson | Tór | 900 stig |
| 3. Jákup Hansen | Streymur | 870 stig |

# Merkiligt heyst fyri FCK

**Eftir 18 dystir í bestu donsku deildini hevur FC Keypmannahavn akkurát somu hagtøl í ár, sum teir høvdu eftir 18 dystir farna ár**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Eftir 18 dystir í ár hevur FC Keypmannahavn vunnið 13, leikt fýra javnar og tapt ein. Hetta er júst somu hagtøl, sum FC Keypmannahavn hevði eftir 18 dystir í farna kappingarárið. Tað, sum helst er meir merkisvert, er, at málúrtøkan er júst tann sama í ár sum í fjør. Teir hava skotið 35 mál, meðan mótstøðuliðini hava fingið 12 mál ímóti FCK. Hetta var eisini málúrtøkan hjá FCK um heystið í fjør.

Venjarin hjá FCK, Ståle Solbakken, heldur hetta tó ikki vera nakað tekin um, at FCK stendur í stað undir hansara leiðslu, tí at felagið hevur havt nógv fleiri og harðari dystir í ár orsaka at luttøku í Champions League.

"Hetta má vera púra tilvildarligt. Eg dugi í øllum førum ikki at síggja aðra forkláring uppá støðuna," sigur Ståle Solebakken.

Síðsta kappingarár vann FCK danska meistaraheitið við 73 stigum eftir 33 umfør, so spennandi verður at síggja, hvussu fer at ganga hjá teimum seinastu 13 umførini.